# Vøkru Vestmanna-oyggjarnar



Í Føroyum eru sum kunnugt 18 oyggjar, tríggjar fleiri enn í íslendsku Vestmannaoyggjunum. Men meðan fólk býr í 17 av okkara oyggjum, er bert fólk ein oyggj bygd í Vestmannaoyggjunum, og tað er Heimey. Tey tilkomnu og eldru minnast helst stóra eldgosið, sum rakti oyggjarnar í 1973. Og hóast tað var ein vanlukka fyri nógvar familjur og oyggjarnar sum heild tá, so hevði eldgosið ta jaligu ávirkan í lítla samfelagnum, at havnin gjørdist munandi betri. Oyggjarnar eru 10.000 ára gamlar og komu fram eftir eitt eldgos á botni í Atlantshavinum. Bert ein býur er í Vestmannaoyggjunum, og har búgva á leið 5.000 fólk. Oyggjarnar eru sera vakrar við høgum fjøllum báðumegin býin. Samband er bæði loftvegis við flogfari, meðan sjóvegis sambandið er úr Torlakshøfn, ið ikki liggur so langt frá Reykjavík.




















